# Niels Bohr – Vísindamaður Kjarnorkualdarinnar

Søgudysturin 2022 snýr seg um vísindafólk, og hvussu tey vóru við til at skapa tann heimin, vit kenna í dag. Føroyar dystast í ár um vitan og kreativitet um Niels Bohr – Vísindamaður Kjarnorkualdarinnar. Fyrsta virðisløn er ein flokstúrur til Danmarkar, sum inniheldur eina rúgvu av mentanarligum, kulinariskum og spennandi upplivingum. Harumframt eru eisini góðar virðislønir til allar luttakandi flokkar.

Fyri at luttaka í Søgudystinum 2022 skulu tit svara einum av teimum tveimum niðanfyristandandi uppgávunum. Tit skulu saman velja, hvørja av uppgávunum tit fegin vilja viðgera. Úrslitið skal vera kreativt, og tað skal vera gjørt í samstarvi við allan flokkin. Flokkurin kann nýta undirvísingartilfarið á føroyskum um Niels Bohr, ið ókeypis kann heintast á https://historiedysten.dk/faeroerne/
Góða eydnu!

## 1. Nobelvirðislønin

Søgudysturin 2022 tekur útgangsstøði í vísindasøgu, tí vit í ár halda 100 ára hátíðarhald fyri, at Niels Bohr fekk nobelvirðislønina í 1922. Hann fekk hana vegna sítt stóra arbeiði við atomástøðinum.

***Uppgáva: Skipið fyri einum stuttligum hátíðarhaldi fyri Niels Bohr, tá hann fekk nobelvirðislønina í 1922.***
*Hvussu vilja tit hátíðarhalda tað? Tit skulu samstarvast um at halda eina veitslu fyri, at hann fekk nobelvirðislønina. Flokkurin kann t.d. hugsa um, hvørjar røður verða hildnar, hvussu veitslan sær út, hvussu nógv eru við, hvar tað verður hildið, um fólk eru fínt ílatin o.a.*
*Verið skapandi, tá tit velja, hvussu tit vilja vísa fagnaðin av móttøkuni av nobelvirðislønini hjá Niels Bohr. Tit kunnu t.d. gera røður, ein film, sjónleik, ein málning, eina tekning, eina myndarøð, snapchat-streak, instagram-video, tiktok-video o.a.*

*Bert hugflogið setur mørk!*

*Óansæð hvussu tit gera tykkara uppgávu, og í hvørjum skapi hon er í, skulu tit skriva ein lítlan tekst (Max 1 síðu), sum greiðir frá, hvat tit hava lagt dent á í arbeiði tykkara og hví. (Lærarin kann eisini skriva hetta). Tað kreativa úrslitið skal kunna latast inn digitalt.*

## 2. Ein opin heimur

Undir 2. heimsbardaga varð atombumban framleidd. Aftaná kríggið vildi Niels Bohr skapa ein opnan heim, har londini kundu deila upplýsingar um framleiðingina av kjarnorkutøknifrøðini. Hann helt, at hetta vildi skapa álit í heiminum, og á tann hátt kundi man sleppa undan nýggjum stríðum. Bohr setti seg tí í samband við amerikanska forsetan og bretska forsetisráðharran fyri at

sannføra teir um at reka ein opinleikapolitikk. Tað eydnaðist ikki Niels Bohr at sannføra teir um hetta opinleikaprinsippið.

***Uppgáva: Gerið eitt átak (eina kampanju) fyri Niels Bohr um opinleikapolitikk.***
*Tit skulu gera eitt átak fyri Niels Bohr, har tit skulu royna at sannføra amerikanska forsetan og bretska forsetisráðharran um at reka ein opinleikapolitikk. Tit skulu samstarvast um at gera eitt átak, sum hevði kunnað sannført teir um at skapa ein meira opnan heim, sum Niels Bohr áður áhaldandi hevði roynt.*
*Hvussu høvdu tit roynt at sannføra teir um opinleikaprinsippið hjá Niels Bohr?*

*Verið skapandi, tá tit velja, hvussu tit vilja gera tykkara átak. Tit kunnu t.d. gera plakatir, greinar, film, myndarøð, røður, kjak o.a., sum kann sannføra amerikanska forsetan og bretska forsetisráðharran um at reka ein opinleikapolitikk í mun til menningina av kjarnorkutøknifrøðini. Tit velja sjálv, hvussu tit vilja føra tykkara átak, og hvussu tit vilja próvføra fyri opinleikaprinsippið hjá Niels Bohr.*

*Bert hugflogið setur mørk!*

*Óansæð hvussu tit gera tykkara uppgávu, og í hvørjum skapi hon er í, skulu tit skriva ein lítlan tekst (Max 1 síðu), sum greiðir frá, hvat tit hava lagt dent á í arbeiði tykkara og hví. (Lærarin kann eisini skriva hetta). Tað kreativa úrslitið skal kunna latast inn digitalt.*

## Innlating av uppgávu

Uppgávan skal handast Det Nationalhistoriske Museum í seinasta lagi 25. november 2022. Alt tilfarið skal vera týðiliga merkt við skúla, flokk, tal á næmingum, uppgávunummar og eisini telefonnummarið og teldupostadressuna hjá læraranum

Í endanum av viku 49 verður tað almannakunngjørt, hvør flokkur hevur vunnið Søgudystin 2022! Skapandi uppgávan skal sendast digitalt. Tit kunnu senda ymsu fílarnar, leinkjurnar o.s.fr. til teldupostadressuna historiedysten@dnm.dk. Filmar, sangir og tilíkt kunnu hægst vara 8 minuttir. Setið tykkum í samband við savnið, um tit tørva hjálp til innlatingina av uppgávunum.

Skapandi uppgávurnar verða mettar av einari fakligari dómaranevnd. Tær verða mettar út frá 3 metingarstøðum:

- Kreativitet í floksins evni til at bera fram søgu á ein originalan, stuttligan og upplýsandi hátt.
- Hugsanirnar hjá flokkinum aftanfyri uppgávuna.
- Samstarvið hjá næmingunum í flokkinum til at seta saman uppgávuna.

*Søgudysturin 2022 presenteraður av Det Nationalhistoriske Museum á Frederiksborg Slot.*